## Ætla at veiða kúlubøku

Seinastu 21 árini hevur tað verið bannað at veiða kúlubøku í Grønlandi, men nú vónar heimasýrið, at grønlendskir veiðimenn aftur kunnu fáa loyvi at veiða nakrar av hesum hvalunum. Finn Karlsen, landsstýrismaður í veiðimálum, sigur við útvarpið í Nuuk, at heimastýrið ætlar at fáa málið fyri á næsta fundi í altjóða hvalaveiðinevndini IWC, sum verður í Alaska síðst í mánaðinum. Kúlubøkustovnurin í Grønlandi er vaksin nógv seinnu árini.

## KLH aðalfund

Hósdagin, Kristi Himmalsferðardag, klokkan 15 fer Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag at halda ársaðalfund í missiónshúsinum í Leirvík. Á fundinum verður orðaskifti um tað, sum er at hoyra og síggja í Degi og Viku í kringvarpinum, og Øssur Winthereig, tíðindaleiðari í sjónvarpinum, Frants Jensen, blaðstjóri og Hilda Viderø, familjuráðgevi, fara at viðgera evnið ”Úrval og innihald í tíðinda flutninginum hjá sjónvarpinum”.

# ur í bygdina



*Tí mugu vit bara staðfesta, at fólk hava búsett seg aðrastaðni, hóast tey so inniliga høvdu viljað bygt her í Vatnsoyrum*



*Teimum dámar væl at syngja. Her eru tey til ársmøti í Nesvík. Um vikuskiftið fara tey til Suðuroyar*

## Sangglaðir klaksvíkingar vitja suðringar

Suðuroyggin fær næstu dagarnar vitjan av KFUM & KFUK kórinum í Klaksvík.

KFUM & KFUK kórið hevur nógvar ár á baki sum streingjakór, og hevur haraftrat latið tvær fløgur úr hondum. Sangirnir ið eru á fløgunum, eru bæði føroyskir og einstakir norðurlendskir streingjakórsangir.

Nú fer kórið so á vitjan í Suðuroy. Skráin hjá KFUM & KFUK kórinum er henda: Í morgin, Kristi Himmalsfaradag kl. 18 verður sungið í missiónshúsinum í Sumba og fríggjakvøldið kl. 20 verður sungið í missiónshúsinum í Vági.

Sangferðin hjá kórinum endar leygarkvøldið kl. 20 í Missiónshúsinum í Porkeri.

**sb.**

eru í gerð. So seint sum í farnu viku fingu børnini í bygdini ein nýggjan sparkivøll av sama slagi, sum tann ið leggjast skal í Miðvági.

Beint frammanundan samrøðuni millum borgarstjórarnar báðar hava vit tosað við ein mann, sum ætlar sær at byggja sethús í bygdini. Hesin hevði sent umsókn til bygdaráðið fyri langari tíð síðani um eitt grundøki, men tað tók sína tíð at fáa svar.

Positiva svarið til hansara var, at gongur alt sum ætlað, kann hann vænta at byrja at byggja síni egnu sethús innanfyri eitt ár.

– So tú sært, Martin, at her fer at koma lív í aftur, sigur Napolion bjartskygdur.

– Ja, tað man treingja til, svarar hin stillisliga aftur.

### Skapa trivnað

Tað var júst hetta sum Martin, hóast komin væl til árs, somuleiðis er upptikin av: At heimbygd hansara má mennast uppaftur meiri í framtíðini.

Hann roynir eftir førimuni at fylgja við í tí, sum hendir innan kommununa og vil fegin geva av vitan síni, um tað skuldi verðið neyðugt.

Sjálvur vil hann ikki geva annað ráð til tann núverandi borgarstjóran enn, at ein altíð eigur at vera varin við tí fíggjarliga partinum.

– Endamálið hjá kommunalu politikkarunum er at skapa trivnað í bygdini, soleiðis at hon kann menna seg.

- Men ein eigur tó altíð at ansa eftir, at javnvág er í. Nógvar kommunur hava helst følt á egnum ryggi, hvørja ávirkan ein alt ov stór lánibyrða hevur havt, sigur Martin, sum sat í bygdaráðnum frá 1976 til 1988, har hann var formaður frá 1984 til 1988.




Størv á Fíggjardeildini

á Almannastovuni

Á almannastovuni starvast í løtuni umleið 100 fólk, harav starvast 6 fólk á Fíggjardeildini.

Hevur tú hug at royna tíni evni á einum arbeiðsplássi í støðugari menning? So eru størv á fíggjardeildini leys at søkja

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Tummas E. Djurhuus, fíggjarleiðar á Almannastovuni - tel. 353510 ella 215476.

Eisini fáast nærri upplýsingar á portal.fo ella almannastovan.fo

Umsóknarfreist er 30. mai 2007 kl.12 00

almannastovan
www.almannastovan.fo